# KLIPPFISK

M. A. WINTHERSGØTA 1



Klippfiskur bjóðar 9 skeið í video í vetur. Skeiðini eru fyrst og fremst ætlað teimum, sum brenna fyri at arbeiða við video, og sjálvt um forkunnleiki ikki er kravdur, so er ikki verri, um luttakararnir hava roynt at spælt við upptøkur áður. Øll skeiðini hava avmarkað luttakaratal, so tey, ið melda seg til fyrst, hava best møguleika at koma við.

## KLIPPFISKAFILMSSKÚLIN:

Tað ber bara til at melda seg til eitt av hesum seks fakunum:

### SKRIVA LEIKRIT

Skeiði er fyri tey, ið fegin vilja læra at menna hugskot og at skriva handrit til stuttfilmar

Undirvísari: Sigga Vang

Luttakaratal: 12

### LEIKSTJÓRN

Serliga ætla teimum, sum vilja læra meira um rolluna sum leikstjóri. Henda rollan er avgerandi fyri, at ein filmsframleiðsla skal eydnast. Ikki øll egna seg sum leikstjóri; tað krevur sína kvinnu ella sín mann. Heldur tú teg egna teg í hesi rolluni, so er at melda teg til.

Undirvísarar: Jákup Veyhe og Jan Berg Jørgensen

Luttakaratal: 8

### KAMERA OG LJÓS

Lær at nýta eitt kamera og lær at brúka ljós til upptøkur.

Undirvísarar: Hans Petur Hansen og Bjørg Mohr Anderssen

Luttakaratal: 8

### FRAMLEIÐSLUSTJÓRN

Framleiðslustjórin ella prodjusarin er við í allari filmsprosessini frá byrjan til enda. Hann ella hon samskipar, ráðgevur og fyriskipar øllum frá peningi til distributión. Samstarvið millum leikstjóra og framleiðslustjóra er avgerandi. Uppgávubýtið er oftast at leikstjórin er kreativi leiðarin meðan framleiðslustjórin stýrir tí mesta av øllum hinum.

Undirvísari: J. Herluf Sørensen og Sigga Vang

Luttakartal: 8

### LJÓÐ

Ljóðarbeiði er eitt øki fyri seg, sum krevur serliga vitan. Ofta kunnu hálvvánaligar upptøkur fáast at rigga, um ljóðsíðan er góð. Á skeiðinum læra tit um at upptaka ljóð, at eftirgera ljóð og at eftirviðgera ljóð á teldu.

Undirvísari: Alexander Gaard Joensen

Luttakaratal: 6

### KLIPPING

Aftaná at upptøkurnar eru gjørdar skal sjálvur filmurin skapast í klippirúminum. Umframt at læra um teknisku partarnar av klippingini læra tit eisini nakað um grundreglur. Forritið, sum verður nýtt, er Adobe Premier Pro. Á hesum skeiðnum er gott at hava teldukunnleika.

Undirvísarar: Thomas Koba og Høgni Heinesen

Luttakaratal: 8

Í hesum 6 fakunum verður undirvíst í vikuskiftum:

Oktober: INTRO - November: *Saman – Framleiðsla* - Desember: *Flokkarnir arbeiða hvør sær*
Januar: *Framleiðsla* - Februar: *Flokkarnir arbeiða hvør sær* - Mars: *Framleiðsla* - Apríl: *Sýningar*

Enn er ikki endaliga fingið uppá pláss, hvørji vikuskifti, undirvíst verður. Tey, ið eru tilmeldaði, vera kunnaði nærri, tá tilmeldingarnar eru lidnar.

### VIDEO OG REDIGERING - FRÁ A TIL Z

Lær alt um video.
Undirvísari: Áki Simonsen
Kvøldskúlaskeið – luttakararnir vera kunnaðir nærri um nær og hvar, tá tilmeldingin er liðug.

Undirvísingardagurin er ikki fastsettur.

Luttakaratal: 12

### EFFEKTARBEIÐI

Eftirviðger av upptøkum hevur fingið ein veldigan leiklut í filmsgerðini. Á hesum skeiðnum er neyðugt at hava hollan teldukunnleika. Millum forritini, ið serliga vera nýtt, er Adobe After Effects.

Undirvísarar: Áki Simonsen og Høgni Heinesen

Undirvísingardagurin er ikki fastsettur.

Luttakaratal: 8 - 12

### UNG -

Hetta er eitt skeið fyri ung - 12 til 15 ár. Skeiðini eru uppbygd soleiðis, at tað verður undirvíst í 3 vikuskifti hetta kvøldskúlaárið. Møguleiki er at vera eitt vikuskifti ella øll.
Her læra tit at gera video – frá hugskoti til klipping.
Undirvísarar: Sigga Vang og Jákup Veyhe

Fyll og klipp lepan út og send hann til:

**Tórshavnar Kvøld- & Ungdómsskúla**
**Frúutrøð 1**
**100 Tórshavn**

Fornavn Eftirnavn

Búðstaður

Telefon E-mailur

Skeiðið, ið eg meldi meg til eitur:

KLIPPFISK